

*Talan var ikki um teir nógvu møguleikarnar, men einar tvær ferðir var VB heilt nær við at skora eftir hornaspark*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

VB-HB 1-0 (0-0)

# Vágbingar aftur omaná

**Eftir at HB tvey ár á rað hevði fingið fult í útidystinum, settu vágbingar tingini upp á pláss, tá teir við einum ansnum verjuavriki hildu tørn móti meistarunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

So er alt, sum tað plagar at vera, mundu tey hugsa í Vági sunnudagin.

Fyrr varð útidysturin í Vági roknaður sum kanska truplasti dysturin á árinum hjá HB. Hóast gulliõ ofta endaði í Havn, so var tað ikki takkað verið stigum úr Vági, har HB nærum hvørja ferð dróg svart. Soleiðis vóru árini 1992-2002 púrasta uttan HB-sigur í Vági, men í fyrraárið bragdaði brádliga, tá Andrew av Fløtum við einum hat-tricki sendi stigini til Havnar. Eisini í fjør endaði tað við HB-sigri, og tí var nakað um tosið, at HB hevði vent hagtølunum í Vági.

### Bjarni rakti tvørtræið

Men hetta vildi VB broyta sunnudagin. Verjuparturin á liðnum hevur riggað væl higartil í ár, men hinvegin hevur tað ikki rigga so væl longur frammi á vøllinum.

Hendan partin royndu vágbingar at betra sunnudagin við einum partvíst yvirfólkaðum miðvølli, har Nenad dróg langt aftur á vøllin. Og hetta riggaði eisini á tann hátt, at VB meira ella minni vann slagið um miðvøllin.

Teir heilt nógvu møguleikarnar gjørdist talan tó ikki um. Fyri steðgin var nakra ferðirnar heilt nær við eftir hornaspark, og eisini hevði Bjarni Johansen eitt langt útspark, sum støkk upp um HB-málverjan og á tvørtræið.

HB var annars liðið, sum hevði bóltin meira, men tað gekk striltið at fáa nakrar veruligar møguleikar burturúr. Sum ikki einaferð í ár, so tykist tað enn vera trupult hjá liðnum at spæla álopsleikararnar, nú hesir eru av minna slagnum, sum helst skulu hava bóltin í beinini heldur enn høvdið.

Nakrar ferðir var tó nær við. Millum annað var Tór-Ingar ta einu ferðina púra leysur, men hesum fekk Bjarni Johansen í málinum tó vart fyri.

### Talvan lýgur ikki

Eftir steðgin helt javna leikgongdin fram, men gott korter fyri leiklok eydnaðist so VB at avgera dystin. Milan Kuljic kom at standa væl fyri, og hann sveik ikki, tá møguleikin beyðst.

Seinastu løtuna royndu gestirnir at trýsta fyri útjavningini, men hetta eydnaðist ikki. Hinvegn kundi VB kanska økt, tá Símun Samulsen smekkaði til, men bólturin tók í stólpan.

Heilt móti dystarloki hevði HB sína bestu roynd, men Páll M. Joensen kundi bara staðfesta, at hetta ikki var teirra dagur, tá hann sá skotið hjá sær smella í stólparótina, áðrenn hann rullaði tvørtur um málið. Kanska eitt tekin um, at árið higartil hevur verið stongina og út enn inn, og í øllum førum lýgur stigatalvan ikki. Hon staðfestir, at HB longu nú hevur tapt tvær ferðir. Tað gjørdu teir bara eina ferð í fjør, men enn er langt eftir á mál í kappingarárinum.

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-HB 1-0 (0-0)**
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan í Hørg, Anders Sørensen, Michael í Lágabø, Kári í Lágabø – Poul N. Poulsen (Eyðstein í Lágabø, 86.), Milan Kuljic, Evrad Ble, Símun Samuelsen – Nenad Zivanovic, Dan Djurhuus
**GK:** Símun Samuelsen 69., Evrad Ble 79., Eyðstein í Lágabø 90.
**HB:** Bárður Johannesen – Hans á Lag (Hallur Danielsen, 63.), Jóhannus Joensen (Svenn Jacobsen 86.), Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen – Rókur Jespersen, Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, John Heri Dam – Jákup á Borg, Tór-Ingar Akselsen (Páll M. Joensen, 61.)
**GK:** Hans á Lag, 28., Rasmus Nolsøe, 86.
**Dómari:** Lassin Isaksen

# Nú er kravið full úrtøka

Sum trífaldir meistarar er einki at siga til, um HB-leikararnir kenna seg eitt sindur kroystar, nú fyrstu tríggir dystirnir bara hava kastað eitt stig av sær.

Hetta ásannaði Jákup á Borg eisini eftir dystin í Vági, og hóast talan hevur verið um truplar uppgávur, so helt hann framvegis ikki, at HB hevur staðið seg nóg væl higartil.

- Enn er helst nakað tíðliga at tosa um nakra kreppu, men tað er einki at ivast í, at vit fegnir vildu havt fleiri stig á kontini. Talan er sjálvandi um truplar uppgávur í Klaksvík og í Vági, men at vit einki fáa nakra staðni av hesum, er ikki nóg gott. Innsatsurin hevur annars verið á eini heilt góðari leið, men vit fáa ikki nóg nógv burtur úr leikligu yvirvágini. Hesaferð haldi eg í øllum førum ikki, at vit áttu eitt tap uppiborið.

Spurdur, hvørjir trupulleikarnir eru á liðnum, heldur Jákup, at tað partvíst er, at teir nú mugu spæla øðrvísi.

- Við mær og Tór-Ingar í álopinum, kunnu vit ikki spæla á sama hátt, sum vit gjørdu við Rógva og Heina. Luftbóltar eru ikki akkurát okkara styrki, og tí mugu bóltarnir koma bæði øðrvísi og skjótari inn um verjuna, um veruligir møguleikar skulu spyrjast burturúr. Tað tekur sjálvandi tíð at finna rætta lagið í hesum, og tað má helst henda skjótt, staðfestir hann.

Komandi tríggjar ferðirnar skal HB spæla á heimavølli, og eftir úrtøkuna higartil heldur Jákup, at kravið nú er púra greitt.

- Vit skulu vinna. Allir tríggir dystirnir mugu og skulu geva fulla úrtøku. Somikið einfalt er tað.

**-jm**

# Gott við einum sigri

Tað var sjálvandi ein fegin VB-liðskipari, sum vit fingu orðið á, eftir at vágbingarnir við sínum fyrsta sigri lættu sær nakað á á stigatalvuni.

- Ja, tað var deiligt við einum sigri. Ikki minst eftir at vit tvær ferðir hava tapt fyri ÍF á heimavølli. Javnleikin í Klaksvík iðraðu vit okkum eisini um, so sum dysturin leið, men undan tí dystinum høvdu vit so verið nøgdir um javnleik.

Um dystin sunnudagin helt Bjarni annars, at teir í VB hildu seg hava sigurin uppibornan.

- Hesaferð riggaði tað væl á miðvøllinum, har vit fingu takið á teimum. Og hóast talan ikki var um so nógvar møguleikar, so var tað nokk í lagi, at vit vunnu.

Sjálvur hevði Bjarni eisini eina roynd, sum rakti tvørtræið, og málverjin staðfesti eftir dystin, at hetta ikki var nøkur tilvild.

- Eg sá, at Bárður var langt úti úr málinum, og tí royndi. Tað var so eisini nær við, at tað eydnaðist, men bólturin fór so á tvørtræið, sigur hann flennandi.

**-jm**